BARNA- OG ÚTBÚGVINGARMÁLARÁÐIÐ

Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3
100 Tórshavn

9. november 2023
Mál: 23/07005-30
Viðgjørt: OS

Svar til Mentanarnevnd Løgtingsins viðv. løgtingsmáli nr. 28/2023: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um lestrarstuðul

1. *Landsstýrismaðurin í barna- og útbúgvingarmálum verður biðin um at upplýsa fyri nevndini, hvussu nógv:*

- *lestrarstuðulin er javnaður við fyri hvørt árið síðani ár 2000 og fram til í dag, og hvat hetta hevði svarað til í útroknaðum árligum miðaljavningarprosenti fyri tíðarskeiðið*

- *nýggi javningarleisturin fyri lestrarstuðul, sum er í uppskoti, hevði givið í lestrarstuðulshækkan fyri hvørt árið síðani ár 2000 og fram til í dag, og hvat hetta hevði svarað til í útroknaðum árligum miðaljavningarprosenti fyri tíðarskeiðið*

Svar
Niðanfyri sæst talva við javningarprosentinum fyri hvørt ár síðani ár 2003[1] sambært galdandi løgtingslóg um lestrarstuðul og sambært leistinum í nýggja lógaruppskotinum.

Síðani ár 2003 er lestrarstuðulin eftir verandi leisti javnaður við samanlagt 25,60%, ið svarar til eitt árligt miðaljavningarprosent á 1,28% fyri tíðarskeiðið. Í talvuni sæst, at summi ár hevur javningarprosentið verið sett til null, hetta hevur í høvuðsheitum verið tey árini, tá roknaða javningarprosentið hevur verið minni enn null.

Um nýggi leisturin hevði verið galdandi síðani ár 2003, hevði lestrarstuðulin verið javnaður við samanlagt 29,62%, ið svarar til eitt árligt miðaljavningarprosent á 1,48% fyri tíðarskeiðið.

Útfrá talvuni sæst, at tað hevði verið ein fyrimunur fyri tey lesandi, um nýggi leisturin hevði verið galdandi síðani ár 2003. Um javningarprosentið fyri 2023 ikki hevði verið so stórt orsakað av høga prístalinum fyri 2023, hevði fyrimunurin enntá víst seg at verði nakað størri.

[1] Brúkaraprístalið pr. mánað verður fyrstu ferð uppgjørt í 2001. Áðrenn hetta er tað árligt brúkaraprístal. Avtalað er tí við Mentanarnevndina at brúka ár 2003 sum fyrsta árið ístaðin fyri ár 2000

Verandi leistur				Nýggjur leistur		
Ár	Javningar-prosent sbrt. verandi leisti	Index 2003 = 100		Ár	Javningar-prosent sbrt. nýggjum leisti	Index 2003 = 100
1. august 2023	7,70%	125,60		1. januar 2023	1,25%	129,62
1. august 2022	2,70%	117,90		1. januar 2022	2,05%	128,37
1. august 2021	0,30%	115,20		1. januar 2021	1,24%	126,32
1. august 2020	1,30%	114,90		1. januar 2020	2,14%	125,08
1. august 2019	1,20%	113,60		1. januar 2019	1,45%	122,94
1. august 2018	1,10%	112,40		1. januar 2018	1,60%	121,49
1. august 2017	0,00%	111,30		1. januar 2017	0,65%	119,89
1. august 2016	0,00%	111,30		1. januar 2016	0,32%	119,24
1. august 2015	0,00%	111,30		1. januar 2015	0,24%	118,92
1. august 2014	0,00%	111,30		1. januar 2014	0,26%	118,68
1. august 2013	2,10%	111,30		1. januar 2013	0,85%	118,42
1. august 2012	0,00%	109,20		1. januar 2012	1,00%	117,57
1. august 2011	0,00%	109,20		1. januar 2011	1,72%	116,57
1. august 2010	0,00%	109,20		1. januar 2010	1,07%	114,85
1. august 2009	0,00%	109,20		1. januar 2009	3,00%	113,78
1. august 2008	3,60%	109,20		1. januar 2008	1,70%	110,78
1. august 2007	1,80%	105,60		1. januar 2007	0,90%	109,08
1. august 2006	2,00%	103,80		1. januar 2006	3,08%	108,18
1. august 2005	0,60%	101,80		1. januar 2005	2,35%	105,10
1. august 2004	1,20%	101,20		1. januar 2004	2,75%	102,75
1. august 2003		100,00		1. januar 2003	2,50%	100,00
Útroknað árligt miðaljavningar-prosent	**25,60%**	**1,28**			**29,62%**	**1,48**

Sambært galdandi løgtingslóg verður lestrarstuðulin javnaður við prosentvísu broytingini í miðalprístalinum fyri undanfarna ár í mun til miðalprístalið fyri árið undan hesum. Sambært nýggja lógaruppskotinum verður javningarprosentið fyri komandi árið útroknað sum miðaltalið av:

1) prosentvísu broytingini í lønarkarminum hjá Fíggjarmálaráðnum í tólv mánaða skeiðnum, sum endaði 1. oktober í verandi ári, og
2) prosentvísu broytingini í brúkaraprístalinum fyri mai í verandi ári, í mun til mai árið fyri.

Í talvuni niðanfyri er ein nærri lýsing av, hvussu komið verður fram til javningarprosentið fyri hvørt einstakt ár eftir nýggja leistinum.

Frá: Mai	2001	2002	2003	2004	2005	2006	2007	2008	2009	2010	2011	2012	2013	2014	2015	2016	2017	2018	2019	2020	2021
Til: Mai	2002	2003	2004	2005	2006	2007	2008	2009	2010	2011	2012	2013	2014	2015	2016	2017	2018	2019	2020	2021	2022
Prísvøkstur	0,00%	1,49%	0,20%	1,66%	2,21%	2,73%	6,69%	-0,86%	0,43%	2,16%	2,20%	-0,33%	-1,16%	-1,26%	-0,93%	1,29%	0,59%	1,77%	-0,08%	3,15%	7,22%
Frá: 1. okt	2001	2002	2003	2004	2005	2006	2007	2008	2009	2010	2011	2012	2013	2014	2015	2016	2017	2018	2019	2020	2021
Til: 1. okt.	2002	2003	2004	2005	2006	2007	2008	2009	2010	2011	2012	2013	2014	2015	2016	2017	2018	2019	2020	2021	2022
Lønarvøkstur	5,00%	4,00%	4,50%	4,50%	0,90%	1,70%	3,00%	3,00%	3,00%	1,00%	0,85%	0,85%	1,63%	1,90%	2,225%	1,90%	2,30%	2,50%	2,56%	2,05%	1,25%
Miðalvøkstur	2,50%	2,75%	2,35%	3,08%	1,56%	2,22%	4,85%	1,07%	1,72%	1,58%	1,53%	0,26%	0,24%	0,32%	0,65%	1,60%	1,45%	2,14%	1,24%	2,60%	4,24%
Frá: 1. jan.	**2003**	**2004**	**2005**	**2006**	**2007**	**2008**	**2009**	**2010**	**2011**	**2012**	**2013**	**2014**	**2015**	**2016**	**2017**	**2018**	**2019**	**2020**	**2021**	**2022**	**2023**
Javning	**2,50%**	**2,75%**	**2,35%**	**3,08%**	**0,90%**	**1,70%**	**3,00%**	**1,07%**	**1,72%**	**1,00%**	**0,85%**	**0,26%**	**0,24%**	**0,32%**	**0,65%**	**1,60%**	**1,45%**	**2,14%**	**1,24%**	**2,05%**	**1,25%**

Til dømis vildi javningin frá 1. januar 2021 verið 1,24%. Hetta er tí, at prísvøksturin frá mai í 2019 til mai 2020 var -0,08%, og almennu lønirnar vuksu við 2,56% frá 1. oktober 2019 til 1. oktober 2020. Miðal av -0,08% og 2,56% er 1,24%.

Er roknaða javningarprosentið hægri enn prosentvísa broytingin í lønarkarminum hjá Fíggjarmálaráðnum, verður javningarprosentið sett til prosentvísu broytingina í lønarkarminum. Hetta síggja vit árini 2007, 2008, 2009, 2010, 2011, 2022 og 2023.

2. *Eisini verður landsstýrismaðurin biðin um eina meting av, hvat nýggi javningarleisturin fer at geva í lestrarstuðulshækkan komandi trý árini samanborið við undir verandi javningarleisti.*

Svar
Í almennu viðmerkingunum til lógaruppskotið er eingin meting gjørd av, hvat nýggi javningarleisturin fer at geva í lestrarstuðulshækkan komandi árini í mun til verandi leist. Orsøkin er, at serliga broytingin í brúkaraprístalinum er ikki kend, og at Barna- og útbúgvingarmálaráðið ikki hevur mett seg kunna gera nakra álítandi meting av komandi brúkaraprístalinum.

Barna- og útbúgvingarmálaráðið hevur enn somu fatan hesum viðvíkjandi, tí ráðið kennir ikki komandi broytingarnar í serliga brúkaraprístalinum, og tí tað er trupult hjá ráðnum at gera eina meting av komandi broytingunum. Ráðið heldur tí, at grundarlag er ikki fyri at gera eina álítandi meting av, hvat nýggi javningarleisturin fer at merkja í mun til verandi javningarleist.

Um hugt verður aftureftir til ár 2003 sæst tó, at nýggi leisturin yvir tíð sær út til at verða til fyrimunar fyri tey lesandi í mun til verandi leist, tí at miðaljavningarprosentið fyri nýggja leistin er hægri.

Í løtuni hava vit tó øgiliga stóran prísvøkstur, sum liggur omanfyri lønarkarmin, ið ger, at nýggi leisturin neyvan er til fyrimunar hjá teimum lesandi beint her og nú. Men innanfyri tey næstu tvey til trý árini, kann roknast við at prísvøksturin aftur er komin niður á eitt meira normalt støði, soleiðis at tað aftur verður fyrimunur fyri tey lesandi at innrokna lønarvøksturin, tá lestrarstuðulin verður javnaður.

BARNA- OG ÚTBÚGVINGARMÁLARÁÐIÐ

Vinarliga

Barna- og útbúgvingarmálaráðið

Djóni Nolsøe Joensen
landsstýrismaður

/Poul Geert Hansen
aðalstjóri

J. H. Schrøtersgøta 7 • FO-100 Tórshavn • Tel: +298 306500 • bumr@bumr.fo